## Undirløn

Norsku fakfeløgini eru ikki serliga fegin um, at skipasmiðjusamtakið Aker Yards flytir fólk av sínari skipasmiðju í Rumenia til Noregs at arbeiða partar av árinum og lønar teimum eftir rumenskum viðurskiftum. Sambært Aftenposten fáa teir rumensku skipasmiðirnir 120 norskar krónur um tíman, men sjálvir fáa teir bara 70 krónur, tí hinar 50 fara til ymisk vælferðartiltøk í Rumenia, og teir kunnu ikki velja annað arbeiði í Noregi.

## Handverkarar stjala

Hagtøl benda á, at handverksmeistarar missa maskinur og amboð fyri umleið eina hálva mia. krónur á hvørjum ári, og tað er lítil ivi um, at tað eru handverkararnir, sum eru syndararnir, skrivar Ritzau. Í handverksmeistarafelagnum verður sagt, at mong hava hug at leggja teir eysturevropeisku handverkararnar undir stuldurin, men tað hendir ofta, at stolin amboð verða funnin aftur heima hjá donskum handverkarum, sigur felagið.

# Sosialurin fremsta og besta blað




**Aftur hesaferð mannaði Sosialurin bás á North Atlantic Fish Fair við tíðindafólki og fólki av marknaðardeildini. Nógv vitjaðu inn á snotuliga básin, og nógv positiv orð fullu um blaðið, ið fólk sum heild mettu vera fremsta – og besta - tíðindablað í Føroyum**

**NAFF**
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Sosialurin hevur verið við og hevur havt bás á øllum teimum seinastu altjóða fiskivinnustevnunum, sum verið hava í Føroyum.

Vit vóru við, tá NAFF seinast varð hildin á økinum hjá Runavíkar havn í 2003, á Sandvíkarhjalla í 2005, og nú høvdu vit so eisini bás á NAFF 2007, sum byrjaði seinasta hósdag og endaði leygardagin.

### Tvinnar uppgávur

Kanska hugsar onkur, hví ikki meira kunning kemur út til okkara lesarar, tá blaðið soleiðis hevur tvey tíðindafólk á bási í tríggjar dagar, og hví verður Portalurin, sum Sosialurin skrivar tíðindini til, ikki betur dekkaður við slík høvi.

Men uppgávan hjá okkum, soleiðis sum básurin er skipaður, verður í fyrst lagi at »selja« blaðið – at siga fólki, at Sosialurin er við, har tað hendur. Básurin er opin út á gólvið, snøggur og væl pyntaður, og áhugin hjá vitjandi at hitta bæði fólk av marknaðardeildini og tey skrivandi er stórur.

Tíbetur.

Á eini slíkari fiskivinnuframsýning, har Sosialurin hevur bás, eru bæði tey, sum vitja inn á gólvið og aðrir framsýnarar annars, áhugaverd, og tú noyðist at »fordeila« teg til at røkka eitt sindur av hvørjum.

Útlendsk fiskivinnubløð høvdu eisini bás á NAFF, og tað hevði Vinnuvitan eisini. Vit trúgva, at uppgávan hjá teimum er at selja bløðini á stevnuni meira enn at »selja« framsýnararnar og tað, sum fyritøkurnar hava at bjóða.

Vit royndu eftir førimuni bæði og góvu okkum stundir til at tosa við fólk – bæði kend og ókend, so tey kendu seg væl á okkara bási. Vit nýttu eisini høvi at tosa við ymiskar framsýnarar og fólk, sum høvdu verið ein »rundtúr« á NAFF.

Birgir W. Høgnesen, sum umboðaði marknaðardeildina, gjørdi nógv burtur úr við at fáa enn fleiri haldarar til blaðið, og her skarst bara heilt væl.

Eini 300 nýggj hald eru teknað!

### Eingin útgáva

Nú lá fiskivinnuframsýningin soleiðis, at bert tann fyrsti dagurin var blaðdagur, og tá fingu vit sjálva setanina við, hóast tíðin var tepur við framskundaðari deadline. Hinir báðir dagarnir vóru ávikavist dýri biðidagur og leygardagur, tá einki blað kemur. Tí høvdu vit hesar dagarnar bert møguleikan at náa út til lesararnar um Portalin.

Av hesi orsøk vórðu ikki tær drúgvu samrøðurnar gjørdar, men heldur smáir greinastubbar, sum eru egnaðir til portal-tíðindi.

Á eini slíkari fiskivinnuframsýning er vanligt, at fyritøkur, sum við eru, eisini hava hug at síggjast í føroysku fjølmiðlunum, og tí vóru tær ikki so fáar, sum vitjaðu inn á gólvið fyri at vita, um vit høvdu hug og umstøður at skriva nøkur orð um teirra virksemi.

# Føroyingar vóru langt frammanfyri danir

**- Eg gjørdist rættiliga ovfarin eftir mina fyrstu vitjan í Føroyum í 1976, tá eg við mínum egnu eygum sá, at føroyingar vóru langt frammanfyri danir, bæði í framleiðslutøkni og marknaðarføring innan fisk og fiskavørur, sigur Mogens From, sum starvast hjá Hansholm havn**

**NAFF**
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Fyrstu gestirnir á básinum hjá Sosialinum, eftir at North Atlantic Fish Fair var sett seinasta hósdag, vóru trý umboð fyri havnina í Hanstholm.

Mogens From, sum er ein eldri maður í dag, hevur afturvendandi vitjað í Føroyum síðan 1976 og Arnhold Johansen, sum er føroyingur og giftur føroyskari konu, hevur starvast sum loðslur í Hanstholm Havn seinastu níggju árini.

Triði maðurin í ferðalagnum úr Hanstholm var Freddy Nielsen, sum er stjóri í Hanstholm Samlecentral, ið hevur fiskamarknað í Hanstholm.

### Góð viðurskifti

Mogens var óføra blíður og prátingarsamur og vildi ógvuliga fegin, at vit lótu fólk vita, at umboð fyri Hanstholm havn hava vitjað í Føroyum.

Á North Atlantic Fish Fair hesaferð hevði eingin donsk havn serstakan – ei heldur felags – bás, men Mogens, Arnhold og Freddy søgdu seg vera komnar upp higar at umboða havnina.

- Vit eru komnir at røkja okkara viðskiftafólki og tosa við gamlar kenningar og hitta nýggj fólk.

Mogens er fyrrverandi vinnulívsmaður og var árini 1974-1989 stjóri í frystihúsinum Nyfrost Hirtshals, sum hevði nógv samband við føroyskar fiskaútflytarar.

- Tá eg byrjaði á Nyfrost Hirtshals, var frystihúsið 2000 fermetrar stórt, men í míni tíð framdu vit tilsamans tríggjar útbyggingar, soleiðis at samlaða gólvvíddin endaði uppi á 10.000 fermetrum.

Tá stórur partur av føroyska fiskaútflutninginum gekk um stóra frystihúsið í Hirtshals, kom Mogens eisini at hava nógv samband við føroyingar.

- Eg hevði nógv samstarv við Robert Poulsen, sála, sum tá var tekniskur stjóri á Føroya Fiskasølu.

### Gjørdist ovfarin

Mogens sigur, at áðrenn hann fyrstu ferð kom til Føroya í 1976, hevði hann skilt í Danmark, at Føroyar vóru aftarliga á vinnuliga økinum.

- Men eg má siga, at eg gjørdist rættiliga ovfarin eftir mina fyrstu vitjan, tá eg við mínum egnu eygum